

*Bispur stóð fyri sínari seinastu konfirmatión, tá ið Finnbjørg Nólsoy Arabo varð konfirmerð í kirkjuni í Kollafirði fyrst í mánaðinum*

# Fyrsta og seinasta konfirmatión

## Finnbjørn Nólsoy Arabo var fyrsti konfirmanturin í føroysku fólkakirkjuni, og hon var samstundis seinasti konfirmanturin hjá bispi

**Konfirmatión**




**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo


Leygardagurin 5. august var ein serligur dagur í kirkjuni í Kollafirði. Tá varð 13 ára gamla Finnbjørg Nólsoy Arabo, ið er uppvaksin á Signabø, konfirmerað. Hetta var fyrsta konfirmatiónin í yvirtiknu føroysku kirkjuni, og hetta var samstundis seinasta konfirmatiónin hjá Hans Jacob Joensen, biskuppi.

Finnbjørg býr saman við familju sínari í London, har pápi hennara, Ben Arabo, starvast hjá oljufelagnum Amerada Hess. Men sjálvsagt skuldi Finnbjørg heim at konfirmerast, og tað gjørdi hon í summarfrítíðini, tá ið javnaldrarnir í Kollafirði longu vórðu konfirmeraðir, og tí var bert hon konfirmerað júst hendan dagin.

Hetta var vikuna eftir yvirtøkuna av fólkakirkjuni, og tí gjørdist konfirmatiónin hjá Finnbjørg eitt sindur serlig.

### Bispur konfirmeraði

Hans Jacob Joensen, bispur, stóð fyri konfirmatiónini, og hetta var fyrsta konfirmatiónin hjá honum, síðani hann gjørdist bispur í 1990. Hetta varð samstundis seinasta konfirmatiónin, tí í november mánaði gevst Hans Jacob í embætinum.

- Prestar vóru burturstaddir, og tí varð eg spurdur, um eg kundi konfirmerað Finnbjørg. Tað vildi eg sjálvsagt. Í tíðini sum sóknarprestur í Havn konfirmeraði eg millum 50 og 100 ung á hvørjum ári, men konfirmatiónin er ein uppgáva hjá prestunum, og tí havi eg ikki havt nakra konfirmatión, síðani eg gjørdist bispur, greiðir Hans Jacob Joensen frá.

- Tað var stuttligt at venda aftur til nakað, sum eg havi gjørt nógv av áður, og konfirmatiónin av Finnbjørg var eitt gott upplivilsi. Sjálvandi er tað øðrvisi at konfirmera eina gentu og ikki ein flokk av ungum, men tað riggaði stak væl, sigur bispur.

### Tilvild at bipsur var fyrstur

Hóast fólkakirkjan eina viku áðrenn var komin á føroyskar hendur, so var konfirmatiónin av Finnbjørg ikki øðrvísi, enn konfirmatiónirnar plaga at verða.

- Vit hava lagt dent á, at kirkjan skal ikki broytast fyri tað, um hon verður føroysk, og tí fór hendan konfirmatiónin fram á sama hátt, sum konfirmatiónirnar í mínari tíð sum prestur fóru fram, sigur Hans Jacob Joensen.

*Kendist tað øðrvísi, nú tú visti, at hann var tín seinasta konfirmatión?*

- Tað haldi eg ikki. Eg havi ikki havt so nógvar konfirmatiónir seinnu árini, og tí var tað hugnaligt í sær sjálvum at sleppa at hava eina konfirmatión aftur.

*Og var tað ætlanin, at tú skuldi hava fyrstu konfirmatiónina í yvirtiknu kirkjuni?*

- Nei, tað var av tilvild, at tað nú gjørdist soleiðis. Aðrir prestar vóru burturstaddir í feriu, og tí varð eg spurdur, um eg kundi taka yvir til hesa einu konfirmatiónina.